NÁM



# SKEIÐ

# VÁRIÐ 2014

# Væl komin á skeið í Námi!
## *– várið 2014*

Í fororðunum til skeiðsfaldaran fyri heystið 2013 varð nevndur trupulleikin við teimum mongu avboðunum, ið seinastu árini eru komin til skeiðini, tá ið líður út á várhálvuna. Tí vórðu skeiðini býtt sundur í heyst- og várumfar, og eru í hesum faldara tilboð um skeið til várhálvuna 2014.

Fyri várhálvuna eru lýst 9 skeið umframt eitt, ið er lýst fyri námsfrøðingar. Vón okkara er, at skeiðini fara at geva lærarum hjálp, vegleiðing og íblástur á ymsum økjum.

**Reglur**
Leiðreglurnar fyri at tekna seg til skeið eru, at tað er skúlaleiðslan, ið teknar allar lærararnar *í einum* til øll tey ynsktu skeiðini. Soleiðis tryggja vit okkum, at tað er leiðslan, ið viðmælir, og at hon fylgir við, hvør fer á skeið og nær. Tað lættir eisini munandi um innanhýsis arbeiðið hjá okkum, at allar skeiðstekningar frá einum skúla koma í senn, ið aftur virkar fyri einum skjótari aftursvari.

Reglur annars um skeiðsluttøku, ábyrgd, samskifti, ferðaendurgjald, fráboðan o.a. eru at finna á heimasíðu okkara www.nam.fo/Skeið/Skeiðsreglur.

**Tekning og tekningarfreist**
Í Námi kunnu vit staðfesta, at skeiðstekningin til heystumfarið gekk væl. Við tí verður heitt á skúlaleiðslur at taka málið um várskeiðini upp við lærarar beinanvegin og fáa teir at umráða seg og seta fram síni ynski. Skeiðstekning verður send Námi við posti ella umvegis teldupost nam@nam.fo. Gevið gætur, at Nám ikki longur hevur telefax.

**Tekningarfreistin er týsdagin 10. desember 2013.**

Tekningarskjal verður heintað á heimasíðu okkara www.nam.fo/skeið – vár 2014/Tekningarskjal.

Málið er, at skeiðsfráboðanir vera á skúlunum, tá byrjað verður aftur 6. januar – fyrsta skeiðið er tann 21. januar.

Við vón um góða undirtøku síggja vit í Námi fram ímóti seinnu helvt av skúlaárinum – ikki minst teimum hugnaligu løtunum saman við tykkum, ið koma á skeiðini.

Vinaliga

**NÁM**
Magnus Tausen


SKEIÐ

Permumynd: Skúlabólkur vitjar í Námi
Myndatøka: Birgir Kruse
Útgáva: Nám

©Nám - november 2014

# Skeiðsálmanakki várið 2014


Januar

| | | |
|---|---|---|
| 21.: | Kom og skriva (fyrri partur) | 6 |
| 28.-29.: | Ítróttur í innskúlingini | 10 |
| 29.: | Kom og skriva (seinni partur) | 6 |

Februar

| | | |
|---|---|---|
| 03.-04.: | Ljóðviðgerð við forritinumum Audacity | 8 |
| 05.-06.: | LP-modellið (fyrri partur) | 5 |
| 07.: | Íblástur til týskttímarnar (fyrri partur) | 7 |
| 09.: | Íblástur til týskttímarnar (seinni partur) | 7 |
| 27.: | Nýggju kristnibøkurnar til 7., 8. og 9. flokk | 7 |

Mars

| | | |
|---|---|---|
| 06.-07.: | Grundskeið í mynda- og lýsingagreining | 9 |
| 11.: | Mentan og náttúra | 6 |
| 12.: | Ítøkilig støddfrøði og talfatan í innskúlingin | 8 |

Apríl

| | | |
|---|---|---|
| 22.: | LP-modellið  (seinni partur) | 5 |


# Innihaldsyvirlit


Námsfrøði

| | | |
|---|---|---|
| 1314-19 | LP-modellið | 5 |
| 1314-20 | Mentan og náttúra | 6 |

Mál

| | | |
|---|---|---|
| 1314-21 | Kom og skriva | 6 |
| 1314-22 | Íblástur til týskttímarnar | 7 |

Hugmyndafrøði

| | | |
|---|---|---|
| 1314-23 | Nýggju kristnibøkurnar til 7., 8. og 9. flokk | 7 |

Náttúruvísindafrøði

| | | |
|---|---|---|
| 1314-24 | Ítøkilig støddfrøði og talfatan í innskúlingini | 8 |
| 1314-25 | Ljóðviðgerð við forritinum Audacity | 8 |
| 1314-26 | Grundskeið í mynda- og lýsingagreining | 9 |

Ítróttur

| | | |
|---|---|---|
| 1314-27 | Ítróttur í innskúlingini | 10 |

*Nr. 1314-19*

# LP-modellið

- læriumhvørvi og námsfrøðilig greining

**Endamál:** At læra at brúka modellið í gerandisdegnum. Meira um modellið á http://www.lp-modellen.dk/.

**Innihald:**
*Fyrsti skeiðsdagur:*
- Ljós verður varpað á LP-modellið og nýtsluna av honum.
- Hugt verður eftir, hvussu hesin arbeiðsháttur kann vera eitt amboð í einum avbjóðandi gerandisdegi í skúlanum. Skeiðsluttakarar verða settir í bólkar og skulu velja, hvønn trupulleika teir vilja arbeiða við.

*Annar skeiðsdagur:*
- Skeiðsluttakarar skulu í bólkum seta trupulleikan, tey hava valt at arbeiða við, inn í LP-modellið og byrja at arbeiða skipað við trupulleikanum.
- Undirvísarin gongur millum bólkarnar og leggur lag á, hvussu farast skal fram.

Í tíðini millum 2. og 3. skeiðsdag skulu luttakararnir arbeiða í skúlanum við tí trupulleikanum, teir hava valt at varpa ljós á. Arbeitt verður skipað eftir LP-modellinum.

*Triði skeiðsdagur:*
- Tikið verður saman um í sambandi við tað arbeiði, hvør einstakur bólkur hevur tikist við, síðan skeiðið byrjaði.
- Tosað verður um tær royndir, luttakarar hava gjørt í sambandi við LP-modellið.
- Luttakarar kunnu fáa hjálp til at orða nýggjan arbeiðssetning, um tørvur er á tí.

**Skeiðssnið:** Upplegg og bólkaarbeiði. Í bólkunum skulu lærarar frá sama skúla arbeiða saman.

**Málbólkur:** Lærarar í fólkaskúlanum. Mælt verður til, at tað í minsta lagi eru fýra skeiðsluttakarar frá sama skúla. Hetta tí teir skulu arbeiða miðvíst við ávísum arbeiðssetningi í tíðini millum 2. og 3. skeiðsdag.

**Undirvísari:** Marin Elisabeth Poulsen, lærari í Odder, ið er føroyingur og kennir væl føroysk skúlaviðurskifti.

**Stað/tíð:** Nám
05.-06.02 og 22.04.2014,
kl. 9.00-15.00
18 lektiónir.

**Viðmerking:**
Áðrenn skeiðið skulu tey, ið tekna seg, orða eitt stutt skriv um tann trupulleika, tey renna seg í skúladegnum. Tað kann t.d. vera *hví er ófriður í flokkinum? hví eru ávísir næmingar so torførir at arbeiða við? hví er so torført at fáa arbeiðsfrið í flokkunum?* o.s.fr. Gjørd verður ein einføld lýsing av teirra trupulleika. Hvør luttakari hevur sína egnu orðing við.

*Nr. 1314-20*

## Mentan og náttúra

Framsýning á Tjóðsavni

**Endamál:**

- at fáa kunnleika um innihaldið og skipanina í allari framsýningini,
- at fáa íblástur og hugskot til undirvísingina á ymsu floksstigunum
- at viðgera, hvussu framsýningin kann supplera undirvísingina
- at menna samstarv millum skúlatænastuna á Tjóðsavni og fólkaskúlan
- vísa á tilfarsdeplar.

**Innihald:**

- felags kunning, skipanin og uppbýti av framsýningini
- rundvísing, tema og evnisbýti
- nýtsla av kunningartøkni í framsýningini
- framløga um námsfrøðiligt tilfar og uppgávur
- atgongd til ískoytis- og kunnandi tilfar
- hugskot og kjak um brúk av Tjóðsavni í skúlahøpi.

**Skeiðssnið:** Felags frágreiðing, rundvísing, bólkaarbeiði og kjak.

**Málbólkur:** Fólkaskúlalærarar.

**Undirvísing:** Palli Askham og Regin Debess, savnslærarar á Søvnum Landsins.

**Stað/tíð:** Tjóðsavn, Brekkutún 6, Hoyvík<br>11.03.2014, kl. 9.00-15.00<br>6 lektiónir.

*Nr. 1314-21*

## Kom og skriva

**Endamál:** Luttakarar fáa innlit og royndir í øðrvísi tilgongdir til skriving, finna og varðveita gleðina at skriva og fáa amboð at nýta sum part av frálæruni í øllum skrivligum lærugreinum.

**Innihald:** Skeiðið er býtt í tríggjar partar:
*1. partur* er skipaður sum felagsskriving, har øll arbeiða stuttar løtur við avmarkaðum uppgávum, lesa upp og læra av úrslitunum. At lesa tekstir upp fyri hvørjum øðrum er ein týdningarmikil partur, sum gevur luttakarum innlit í fjølbroytni og møguleikar. Vit ganga ígjøgnum ymsar skriviteknikkir, uppbygging av søgum, gera persónslýsingar o.a. Luttakarar skriva hvør sín tekst.

*2. partur* er heimaarbeiði. Hildið verður fram við tekstinum heima, og verður hann sendur skeiðsleiðaranum til persónligar viðmerkingar.

*3. partur* fevnir um framhaldandi arbeiði við tekstunum í mun til viðmerkingarnar. At enda verða tekstirnir lisnir upp.

**Skeiðssnið:** Luttakarar skriva sjálvir og royna ástøðina í snarskriving so hvørt. Hvør luttakari skrivar lítla stuttsøgu og fær persónliga vegleiðing, soleiðis at eitt endaligt úrslit kemur burturúr.

**Málbólkur:** Lærarar í miðnámi í øllum málsligum lærugreinum eins og lærarar í lærugreinum, har onnur skrivlig avrik skulu gerast sum t.d. frágreiðingar og serritgerðir.

**Undirvísing:** Rakel Helmsdal, sjálvstøðugt listafólk, rithøvundur, leikhússtjóri á Karavella Marionett-Teatri, undirvísari í skriving síðan 2000. www.rakelhelmsdal.info.

**Tíð og stað:** Nám<br>21. og 29.01.2014, kl. 9.00-15.00<br>12 lektiónir.

**Viðmerking:** *Snarskriving* ella *HBíG* (halt blýantinum í gongd) er skriviháttur, sum broytir vanligu fatanina av, hvussu tekstir skulu skrivast. Eisini gevur hann eitt øðrvísi innlit í skrivitilgongdina.

*Nr. 1314-22*

## Íblástur til týskttímarnar

– íblástur frá Cooperative Learning

**Endamál:** At geva hugskot og íblástur til, hvussu lærarar í týskum kunnu skapa fjølbroytta, læruríka og hugvekjandi undirvísing í eini tilgongd, sum støðugt mennir fakliga støðið og stimbrar ein virknan leiklut millum næmingarnar.

**Innihald:** Lærarar fáa innlit í, hvussu teir kunnu arbeiða við orðatilfeingi, framburði, tekstfatan og mállæru við amboðum úr Cooperative Learning, sum serstakliga egna seg til fremmandamálsundirvísing. Skeiðsluttakarar fáa eitt skrivligt upprit við ymisku leistunum at arbeiða eftir og høvi at venja nýggju arbeiðshættirnar í skúlahøpi millum skeiðsdagarnar.

**Skeiðssnið:** Skeiðið fevnir um tveir dagar við tveimum mánaðum millumbili. Tað byggir á framløgu, kjak og praktiskar royndir í bólkum umframt samanumtøku seinna skeiðsdagin.

**Málbólkur:** Allir lærarar, sum undirvísa ella hava hug at undirvísa í týskum í fólkaskúlanum.

**Undirvísing:** Fríða á Skipagøtu, miðnámsskúlalærari við serritgerð í Cooperative Learning í fremmandamáli.

**Stað/tíð:** Nám
07.02. og 09.04.2014, kl. 9.00-15.00
12 lektiónir.

*Nr. 1314-23*

## Nýggju kristnibøkurnar til 7., 8. og 9. flokk

**Endamál:** At kunna um, hvussu kristnitilfarið í 7., 8. og 9. flokki verður nýtt.

**Innihald:** Framløga av tilfarinum og hugtakið handan bøkurnar, námsætlanin og próvtøka.

Komið verður inn á:
- høvuðstættirnar í kristindóminum
- fremmandan átrúnað
- kristna list
- ymisk tekstasløg
- siðalæru
- samskifti millum lærara og næming
- samskifti næmingar sínámillum.

**Skeiðssnið:** Upplegg og orðaskifti. Arbeiða við smærri uppgávum og próvtøkuspurningum.

**Málbólkur:** Tey, ið undirvísa í kristni í nevndu flokkum.

**Undirvísing:** Charlotta Thorsteinsson og Paulina Andreasen, lærarar.

**Stað/tíð:** Nám
27.02.2014, kl. 9.00-15.00
6 lektiónir.

**Gevið gætur:** Les skeiðslýsingarnar gjølla t.d.
- um hvussu skeiðið verður skipað,
- um møgulig førleikakrøv verða sett,
- um luttakarar skulu hava eitthvørt við til skeiðið, ella um eitthvørt skal lesast,
- um hvønn málbólk skeiðið vendir sær til og
- um, hvar og nær tað verður hildið.

Hóast Nám umvegis FirstClass-skipanina sendir út áminning undan skeiðinum, áliggur tað skúlaleiðslu og luttakara at skráseta og *minnast* skeiðið, tá ið dagurin upprennur. Skeiðstekningin verður roknað sum bindandi. Tí eigur at verða lagt soleiðis til rættis, at luttakari ikki verður settur til ella átekur sær aðra uppgávu teir dagarnar, skeiðið er.

*Nr. 1314-24*

## Ítøkilig støddfrøði og talfatan í innskúlingini

**Endamál:** Hugaligt er at leggja aðra undirvísing til rættis enn nett hana, bókin leggur upp til. Atlit skulu tá sjálvsagt takast at umstøðum í viðkomandi skúla (næmingar, karmar og tilfar).

Av hesi orsøk eru heilt víst nógv ymisk dømi um, hvussu ein leggur sær støddfrøðina til rættis – tessvegna fara skeiðsluttakarar ætlandi heim við ymsum nýtiligum hugskotum.

**Innihald:** Løgd verða fram ítøkilig dømi, og kjakast verður um ymsar vinklar av somu søk – at *arbeiða ítøkiliga og menna talfatanina* í innskúlingini.

**Skeiðssnið:** Framløga, sjálvstøðugt- og okkurt bólkaarbeiði.

**Málbólkur:** Støddfrøðilærarar/-vegleiðarar og lærarar við serundirvísing í fólkaskúlanum.

**Undirvísing:** Jákup av Skarði, lærari.

**Stað/tíð:** Nám
12.03.2014, kl. 9.00-15.00
6 lektiónir.

*Nr. 1314-25*

## Ljóðviðgerð við forritinum Audacity

**Endamál:** Luttakarar læra at taka upp ljóð og viðgera ljóð á teldu, soleiðis at ljóðfílur kunnu brúkast sum eitt amboð í undirvísingini.

**Innihald:** Luttakarar læra at gera og viðgera ljóðfílur við forritinum Audacity, at leita eftir ljóðbitum á alnetinum og annars at arbeiða við, hvussu hetta kann brúkast í undirvísingini. Eisini verður víst á ymisk hjálpiamboð til konvertering av ljóði og til at taka ljóðbrot av netinum.

**Skeiðssnið:** Undirvísari hevur framløgu og luttakarar arbeiða sjálvstøðugt.

**Málbólkur:** Lærarar í fólkaskúlanum.

**Undirvísing:** Heini Nygaard, lærugreinaráðgevi.

**Stað/tíð:** Nám
03.-04.02.2014, kl. 9.00-15.00
12 lektiónir.

**Fast samband:**
Í samráði við Posta verður bílagt tilfar sent skúlum/stovnum og heintað aftur eftir avtalu.
Vanliga verður sent soleiðis:

- Mánadag: Norðuroyggjar, Vágar, Sandoy, Suðuroy, Nólsoy, Hestur, Skúvoy
- Týsdag: Eysturoy, Streymoy
- Mikudag: Tórshavn.

Bílegging til postsending skal fara fram í góðari tíð – í seinasta lagi dagin fyri avgreiðsludag. Flokssett og bókakassar, ið ætlanin er at heinta, skulu bíleggjast í seinasta lagi dagin fyri. Filmar og tilfar úr Kunningarsavninum kann tó lænast við diskin.

*Nr. 1314-26*

# Grundskeið í mynda- og lýsingagreining

**Endamál:** Endamálið við skeiðinum er at geva luttakarum grundleggjandi innlit í myndabygnað, og hvussu hesin verður nýttur til at skapa ein boðskap í myndini. Tað sama ger seg galdandi innan lýsingar, har luttakarin fær vitan um, hvørji amboð verða nýtt fyri at fáa lýsingaboðskapin fram. Luttakarin fær innlit í ymisk sløg av lýsingum eins og tikið verður í styrkirnar og veikleikarnar hjá ymsu miðlunum, lýst verður í.

**Innihald:** Myndir fáa alsamt størri týdning í miðlarúminum – bæði tí at møguleikin er størri fyri útbreiðslu, men eisini tí at alsamt fleiri fólk – serstakliga børn og ung – sjálvi fáa atgongd til amboð til myndatøku og -viðgerð. Í kjalarvørrinum á myndunum koma lýsingar – bæði sum myndir, men eisini sum sjónvarpslýsingar og lýsingar gjørdar serstakt til nýggju miðlarnar við børnum og ungum í huga.

*Myndagreining*
Í hesum sambandi verður arbeitt við
- bygnaði, so sum rørslu, dýpd, javnvág
- litum og litavali
- týdningi og hjátýdningi
- avsendara- og móttakaraboðskapi.

*Lýsingagreining*
Til lýsingagreining verða nýtt nøkur av somu amboðunum, sum nýtt vórðu til myndagreining, umframt at arbeitt verður við spurningum sum
- hvat er ein lýsing
- hví nýta vit lýsingar
- hvat vil ein lýsing
- lýsingapróvførsla
- ymisk lýsingasløg.

**Skeiðssnið:** Undirvísingin er skipað við uppleggum og fleiri einstaklinga- og bólkauppgávum.

**Fyrireiking:** Nakað av lýsingatilfari verður savnað saman at greina á skeiðinum.

**Málbólkur:** Fólkaskúla- og miðnámsskúlalærarar.

**Undirvísing:** Elin Michelsen. Korrespondentur í enskum. Margmiðlasniðgevi. Master í tvørmiðlasamskifti. Fyrrverandi lýsingaráðgevi.

**Stað/tíð:** Nám
06.-07.03.2014, kl. 9.00-15.00
12 lektiónir.

**Gevið gætur:** Fyri skeið hjá Námi er skipanin tann, at øll skeiðstekning skal
- vera í samráð og við viðmæli frá skúlaleiðslu
- vera skrivað á skeiðsskjal, ið kann takast niður frá heimasíðuni www.nam.fo og
- *í einum* verða send Námi við posti ella umvegis teldupost nam@nam.fo.
- **Tekningarfreistin er týsdagin 10. desember 2013**.

Gjørt verður vart við, at Nám ikki longur hevur telefax.

*Nr. 1314-27*

# Ítróttur í innskúlingini

**Endamál:** At geva luttakarum førleikar/amboð at geva næmingum mennandi og innihaldsríkar ítróttatímar.

**Innihald:**

- Grundfatan
- Motoriskar venjingar
- Spøl
- Ítróttur skal vera stuttligur, so at øll tíma at vera við.

Umráðandi er at vera klæddur til at vera virkin.

**Skeiðssnið:** Framløga, venjingar, spøl og bólkaarbeiði.

**Málbólkur:** Lærarar í innskúlingini.

**Undirvísing:** Ása Beder, fólkaskúlalærari og fimleikavenjari.

**Stað/tíð:** Skúlin við Løgmannabreyt
28.-29.01.2014, kl. 9.00-15.00
12 lektiónir.

NÁM
WWW.NAM.FO
Hoyvíksvegi 72 - Postrúm 3084 - FO-110 Tórshavn - Telefon +298 755 150 - nam@nam.fo